## Stjórnin minni undirtøku

Sambært einari meiningakanning í Danmark hevur tann borgarliga stjórnin mist so nógv av sínari undirtøku millum fólk, at undirtøkan er tann minsta í seks ár. Kanningin, sum Megafon hevur gjørt, vísir, at hevði fólkatingsval verið í dag, høvdu flokkarnir vinstrumegin miðjuna fingið 92 fólkatingslimir, meðan teir báðir stjórnarflokkarnir og Danski Fólkaflokkurin høvdu fingið 83. Eygleiðarar í Keypmannahavn siga kanningina vera eitt tekin um, at tann stóra stjórnarbroytingin og tann búskaparliga bjargingarætlanin hjá stjórnini hava ikki givið úrslit millum veljararnar.



## Turka fisk í Kanada

Fyritøkan JHS Fish Products, sum íslendingar eiga, fer nú at turka fisk á einari nýggjari verksmiðju í Nova Scotia í Kanada. Fiskifréttir skriva, at verksmiðjan, sum er tann fyrsta av sínum slagi í Kanada, kostar um 500 milliónir íslendskar krónur. Ætlanin hjá eigarunum er at turka umleið 14.000 tons av høvdum og ryggjum um árið, og rávøruna skal virkið hava frá veitarum í Nova Scotia og í New England í USA. JHS Fish Products hevur framman undan eitt turkivirki í Grimsby í Onglandi. Tað byrjaði fyri trimum árum síðani.

# Virkispraktikk er lyklaorðið

**- Trupulleikin hjá ungum arbeiðsleysum er ofta, at tey ongar royndir hava á arbeiðsmarknaðinum, og tí vita ty ikki, hvat arbeiði tey dáma og hvar tey trívast. Tí er so sera umráðandi, at vit fráa sett eina virkispraktikkskipan í verk, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen, sum hevur drúgvar royndir sum sosialráðgevi hjá arbeiðsleysum**

UNGDÓMS-ARBEIÐSLOYSI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bergtóra Høgnadóttir Joensen, løgtingslimur fyri Tjóðveldi, er útbúgvin sosialráðgevi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vit høvdu í blaðnum í gjár samrøður við Ernst Jacobsen, stjóra á ALS, og Rodmund Nielsen, vinnulívsmann, í sambandi við eitt nýtt heildagsskeið, sum ALS hevur tikið stig til, og sum skal motivera tey ungu arbeiðsleysu.

Hetta er nýtt slag av skeiðum, sum hava til endamáls at brynja ung arbeiðsleys til eitt aktivt lív á arbeiðsmarknaðinum, og hetta eru samstundis skeið, sum hava kravda uppmøting.

Skeiðsleiðari er Bergtóra Høgnadóttir Joensen, sum av proffessión er sosialráðgevi, og hon hevu rdrúgvar royndir frá sínum arbeiði sum sosialráðgevi millum arbeiðsleys í Danmark.

- Eg havi arbeitt sum sosialráðgevi millum arbeiðsleys í Danmark í eini tíggju ár. Talan var tó ikki bert um ung arbeiðsleys, men eisini fólk við øðrum trupulleikum, eitt nú fólk við einari revsiattest og sálarliga veik fólk, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Tað var tí rættiliga nærliggjandi, at ALS heitti á hana um at skipa fyri hesum nýggju skeiðunum, og fyribils hevur so fyrsta skeiðið verið.

- Tað var 15. mars, og skal ein einstreingjað niðurstøða gerast, so hildu luttakararnir, at skeiðið var munandi betri og meiri læruríkt, enn tey framman undan høvdu roknað við, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Og tað, sum serliga varð væl móttikið, var hugskotið at skipa fyri virkispraktikki soleiðis, at tey ungu sleppa út í praktikk á ymsum arbeiðsplássum fyri at royna síni evnir og fyri at vita, um tey trívast í júst tí fakinum.

### Neyðugt við royndum

Við á hesum heildagsskeiðinum eru ein virkisstjóri og sjónleikarar. Vit greiddu í blaðnum í gjár frá, hvør uppgávan hjá virkisstjóranum, Rodmundi Nielsen, var, nevniliga at greiða eitt sindur frá, hvussu tú fyriheldur teg fyri at fáa eitt starv, og hvussu tú varðveitir eitt starv. Eisini kom hann inn á spurningin, hvat ein virkisleiðari væntar sær av sínum starvsfólkum.

Sjónleikararnir verða nýttir til rollupspøl, serliga í sambandi við hvussu tú førir eina setanarsamrøðu, og hvussu tú ber teg at í sambandi við starvssøkjan.

- Tað finnast skeið í, hvussu tú søkir eitt starv, hvussu tú fyrihelur teg til setanarsamrøður og hvussu tú skrivar eitt CV. Men felags fyri flestu skeiðini hjá ALS er, at tað er sjálvboðið, um tú teknar teg til, og tað hevur víst seg, at sera fá ung tekna seg til tey skeiðini, ið ALS annars skipar fyri, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Hon heldur, at tað hevur stóran týdning, at tey ungu kenna seg sum ein part av arbeiðsmarknaðinum og harvið ein part av samfelagnum.

- Tað er ikki vist, at øll hava somu uppfatan av, hví tað hevur týdning av hava eitt starv. Summi halda peningurin hevur størstan týdning, onnur halda kensluna av at gera ein mun verða tað týdningarmesta, meðan uppaftur onnur halda, at sosiala samveran telur mest, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Men uttan mun til, hvat fólk annars halda hevur týdning, so er tað ómetaliga umráðandi, at tey ungu, óroyndu, sleppa at prøva seg av fyri at vita, hvar teirra hugur og hegni liggur.

### Gevur møguleikar

Tí er virkispraktikk ein so góð loysn.

- Nýggja lógin fyri ALS letur eisini upp fyri hesum møguleikanum, og tað er næstan alfa og omega hjá teimum ungu, at fáa hendan møguleikan. Tú kanst siga, at loysunarorðini eru útbúgving, virkispraktikk og individuel ráðgeving, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Tá talan er um virkispraktikk verður ofta ført fram, at fakfeløgini neyvan fara at góðtaka hesa skipanina, men har er Bergtóra ikki samd.

- Um talan er um størv, sum framman undan ikki eru nomineráð, so dugi eg als ikki at síggja, at fakfeløgini skulu hava nakað ímóti tí. Ein slík skipan kann jú eisini koma limunum hjá fakfeløgunum tilgóða, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Virkispraktikkur kann hinvegin hjálpa teimum ungu at stýra inn á ta lívsleið, ið fyri tey er hin júst rætta. Og tað er eitt av endamálunum hjá nýggju skeiðunum, sum ALS skipar fyri.

- Í løtuni eftirmeta vit fyrsta skeiðið, og tað verður gjørt í samráð við tey, sum luttóku. Men tað er longu greitt, at trý slík skeið verða aftrat í vár, tvey í apríl og eitt í mai. Og hetta verður góður møguleiki at bryjna tey ungu til arbeiðsmarknaðin, tí tað er greitt, at verandi kreppa ikki fer at halda fram í allar øvir, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

# Ungdómsarbeiðsloysi ein trupulleiki

**Tað er hópurin av ungum arbeiðsleysum, sum ikki eru skrásett, tí tað eru bert tey, sum hava verið á arbeiðsmarknaðinum, ið kunnu skrásetast hjá ALS**

UNGDÓMS-ARBEIÐSLOYSI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur verið og verður framvegis varpað ljós á ungdómsarbeiðsloysi.

- Og tað er ómetaliga gott, tí tað er ein alsamt vaksandi trupulleiki, ið vit eiga at leggja stóran dent á at basa, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Hon sigur, at í kreppuárunum skipaðu flestu kommunurnar fyri tiltakinum, Ung í arbeiði, og tað heldur tinglimurin hjá Tjóðveldi er ein gyltur møguleiki fyri tey ungu.

- Við tí tiltakinum fingu tey ungu ein góðan møguleika at royna seg av á ymsum starvsøkjum, og funnu útav, hvat slag av arbeiði tey dámdu, og hvat avgjørt ikki vóru tey, sigu Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

- Tað er ein sannroynd, at skúlin ikki fdellur líka lætt hjá øllum, og tað er nakað, ið meiri átti at verið gjørt við.

- Tað hevur týdning at finna útav, hvat tað er sum ger, at skúlin gerst so tungur hjá summum næmingum, og tað gerst best gjøgnum samrøður fyri at finna út av, hvar trupulleikin liggur, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Hon sigur, at fólk eru so ymisk, og tí er neyðugt við individuellari ráðgeving.

- Tað er neyðugt at fáa lýst hvat skal til, fyri at fáa fólk út aftur á arbeiðsmarknaðin, tí vit mugu ikki undirmeta, hvat arbeiðssamleikin hevur at týða fyri fólk, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Tað vísir seg eisini, at færri og færri størv eru til ófaklærd.

- Millum 80 og 90 prosent av teimum skrásettu í ALS eru ófaklærd, og av teimum eru tey flestu menn. Men kortini er greitt, at tað eru tey ungu, ið eru eitt knútapunkt, tí tey sum regul ongar royndir hava, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Hon hevur onga lidna loysn um, hvussu arbeiðsloysið millum ung verður bast, men vísir til, at flokkur hennara hevur gjørt eitt uppskot í níggju punktum, sum er eitt stig á leiðini.

- Men tað mest umráðandi er, at vit fáa staðfest veruligu tølini fyri ung arbeiðsleys, tí tey ungu, sum ongantíð hava verið á arbeiðsmarknaðinum liggja ikki inni í hagtølunum hjá ALS. Tá vit so kenna veruligu tølini, mugu vit taka trupulleikan haðani, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.